SVIMJISAMBAND FØROYA
Faroe Islands Swimming Association
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Norrøna Svimjisambandið (NSF)
Ligue Européenne de Natation (LEN)
Fédération Internationale de Natation (FINA)

# Kravtíðir til HM í Budapest 2017

Starvsnevnd SSF hevur samtykt fylgjandi kravtíðarskipan til HeimsMeistarastevnuna í svimjing 2017, sum verður í Budapest í Ungarn frá 23. til 30. juli 2017.

Sjálvar kravtíðirnar til einstaklingakappingar eru sum ásettar av altjóða svimjisambandinum FINA, sí http://fina.org/sites/default/files/memo_qualif_times_events_bud2017_02052016.pdf

Tað vil siga við A og B kravtíðum, har B-kravtíðin kann nýtast um einans luttakari er í viðkomandi kappingargrein, og A-kravtíðin ífall at tveir luttakarar av sama kyni vilja luttaka í somu grein.

Vit kunnu í mesta lagi melda tveir (2) svimjarar av sama kyni til hvørja grein, og verða tveir (2) teir skjótastu tí valdir ífall at fleiri enn tveir (2) klára kravtíðina til somu grein.

Starvsnevndin kann velja at taka út eyka svimjarar, upp til og við at hópurin er tilsamans tvær (2) kvinnur og tveir (2) menn, sambært FINA reglu BL 9.3.6.2. Hesir eyka svimjarar skulu tá sambært treytum FINA hava luttikið á annaðhvørt FM á langgeil 2017 ella á FINA góðkendari úttøkustevnu til HM, og kunnu tá í mesta lagi luttaka í tveimum (2) greinum.

Starvsnevndin kann í prinsippinum eisini velja at taka út eyka svimjarar til liðsvimjing. Og úttøka av juniorum kann koma upp á tal, serliga um færri enn tveir seniorar av hvørjum kyni klára kravtíð.

Kravtíðarskeiðið er frá og við 1. mars 2016 til og við 28. mai 2017 (til og við FM á langgeil 2017)

Sí annars “Reglugerð um úttøku og kravtíðir”:

http://www.ssf.fo/felagsskapur/reglugerd/reglugerd-um-uttoeku-og-kravtidir/

Feløgini verða biðin um at fráboða Svimjisambandinum um teir svimjarar ið hava klárað kravtíð, við tilskilan av grein og tíð, umframt nær og hvar tíðin varð svomin.

Landsliðið til HM í svimjing 2017 verður úttikið sum skjótast aftaná FM á langgeil 2017.

Vegna Svimjisamband Føroya

Rókur í Jákupsstovu

ATLANTIC AIRWAYS

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Norrøna Svimjisambandið (NSF)
Ligue Européenne de Natation (LEN)
Fédération Internationale de Natation (FINA)

# Kravtíðir til HM í Budapest 2017

At klára á langgeilastevnum góðkendar av FINA sum úttøkustevnur til HM 2017

| Kravtíðir - Menn | | | Kravtíðir - Kvinnur | |
|---|---|---|---|---|
| **A - 2 svimjarar** | **B - 1 svimjari** | | **A - 2 svimjarar** | **B - 1 svimjari** |
| 0:22.47 | 0:23.26 | **50 frí** | 0:25.18 | 0:26.06 |
| 0:48.93 | 0:50.64 | **100 frí** | 0:54.90 | 0:56.82 |
| 1:47.73 | 1:51.50 | **200 frí** | 1:58.68 | 2:02.83 |
| 3:48.15 | 3:56.14 | **400 frí** | 4:10.57 | 4:19.34 |
| 7:54.31 | 8:10.91 | **800 frí** | 8:38.56 | 8:56.71 |
| 15:12.79 | 15:44.74 | **1500 frí** | 16:32.04 | 17:06.76 |
| 0:25.29 | 0:26.18 | **50 rygg** | 0:28.52 | 0:29.52 |
| 0:54.06 | 0:55.95 | **100 rygg** | 1:00.61 | 1:02.73 |
| 1:58.55 | 2:02.70 | **200 rygg** | 2:11.53 | 2:16.13 |
| 0:27.51 | 0:28.47 | **50 bringa** | 0:31.22 | 0:32.31 |
| 1:00.35 | 1:02.46 | **100 bringa** | 1:07.58 | 1:09.95 |
| 2:11.11 | 2:15.70 | **200 bringa** | 2:25.91 | 2:31.02 |
| 0:23.67 | 0:24.50 | **50 firvald** | 0:26.49 | 0:27.42 |
| 0:52.29 | 0:54.12 | **100 firvald** | 0:58.48 | 1:00.53 |
| 1:57.28 | 2:01.38 | **200 firvald** | 2:09.77 | 2:14.31 |
| 2:00.22 | 2:04.43 | **200 blandað** | 2:13.41 | 2:18.08 |
| 4:17.90 | 4:26.93 | **400 blandað** | 4:43.06 | 4:52.97 |

ATLANTIC AIRWAYS